# Kenneth Gormsen fekk hevnd

*Danin Kenneth Gormsen fekk hevnd á Gunnari Dahl-Olsen, tá ið hann vann seinastu Grand Prix Føroyar kappingina*

STEFAN Í SKORINI

Gunnar Dahl-Olsen skuldi bara hava níggju stig fyri at vinna Grand Prix Føroyar. Nærmasti kappingarneyti hansara, Kári Brattaberg, var somikið langt aftanfyri, at eingin spenningur var um vinnaran av samanlagdu kappingini. Meiri spenningur var harafturímóti um, hvør vann seinastu kappingina. Kappingin varð skipað soleiðis, at fyrst varð koyrt í 50 minuttir, og síðani varð eitt umfar koyrt afturat.

Í seinastu etapuni av Statoil Kring Føroyar bardust Kenneth Gormsen og Gunnar Dahl-Olsen um fyrsta plássið, og tá vann Gunnar við góðari hjálp frá Team Shell. Hesuferð var Gormsen aftur við, men eingin koyrdi saman í liðum. Gormsen megnaði hesuferð at basa Gunnari, sum undan kappingini mestsum hevði tryggjað sær samlaða sigurin. Harvið fekk Gormsen hevnd yvir tapið í seinastu etapuni av Statoil Kring Føroyar. Jóhann Brend kom triðjur á mál, og hann endaði á fjórða plássi í samlaðu kappingini. Restin av súkkarunum endaðu allir meira enn eitt umfar aftanfyri vinnaran Kenneth Gormsen.

Jóhann á baki kom Kári Brattaberg, sum gjørdist nummar tvey í samlaðu kappingini aftanfyri Gunnar. Fimtur á ólavsøku var Sverri Mohr Edvinddon, og hann gjørdist nummar trý samanlagt. Kári skuldi bara enda frammanfyri Sverra fyri at tryggja sær annað plássið, og líkt er til, at hann mest hevur hugsað um hetta heldur enn at hugsa um at vinna kappingina. Jákup Johansen var ein av trimum súkkarum, sum býr á flatlondum dagliga, og hann kom á mál sum nummar seks. Kenneth Gormsen og Jóhann Brend búgva eisini niðri í Danmark og koyra fyri CC Gladsaxe.

Næst á skránni hjá føroyskum súkklarum er føroyameistaraskapið, sum verður miðskeiðis í august. Tá verður Gormsen ikki við, og Gunnar Dahl-Olsen er klárur favorittur, um Rógvi Johansen ikki kemur heim til kappingina. Tá verður ein kapping í landavegskoyring og ein einkultstartur. Landavegskoyringin er 100 kilometrar, meðan einkultstarturin er 30 kilometrar.



*Gunnar Dahl Olsen mátti taka til takkar við øðrum plássinum á ólavsøku, men samanlagt var eingin ivi um gullið*
*Mynd: SJ*

**Endaliga støðan í Grand Prix Føroyar 2000**

**Menn**

| Nr | Navn | Býur | Point |
|---|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | Tórshavn | 182 |
| 2 | Kári Brattaberg | Vágur | 143 |
| 3 | Sverri Mohr Edvinsson | Tórshavn | 128 |
| 4 | Jóhann Brend | Tórshavn | 120 |
| 5 | Esmar Joensen | Hvítanes | 101 |
| 6 | Eyðun Poulsen | Tórshavn | 93 |
| 7 | Rógvi Johansen | Vágur | 80 |
| 8 | Evald Rasmussen | Hoyvík | 66 |
| 9 | Geyr Gilsteinsson | Hoyvík | 64 |
| 10 | Christian Guttesen | Norðdepil | 48 |
| 11 | Kenneth Gormsen | Gladsaxe | 40 |
| 12 | Jákup Johansen | Vágur | 20 |
| 12 | Kári Simonsen | Tórshavn | 20 |
| 14 | Tony Ditlevesen | Tórshavn | 18 |
| 15 | Jón Ellingsgaard | Tórshavn | 16 |

**Úrslitið av ólavsøkukappingini**

**Menn**

Nr Navn Býur Umf. eftir vinnaran Stig

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Kenneth Gormsen | Gladsaxe | 40 |
| 2 | Gunnar Dahl-Olsen | Tórshavn | 34 |
| 3 | Jóhann Brend | Tórshavn | 30 |
| 4 | Kári Brattaberg | Vágur | 26 |
| 5 | Sverri Mohr Edvinsson | Tórshavn | 23 |
| 6 | Jákup Johansen | Esbjerg | 20 |
| 7 | Tony Ditlevesen | Tórshavn | 18 |
| 8 | Esmar Joensen | Hvítanes | 16 |
| 9 | Eyðun Poulsen | Tórshavn | 14 |
| 10 | Geyr Gilsteinsson | Hoyvík | 12 |

**Dreingir 10-14 ár**

Nr Navn Aldur Stig

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Beinur Jacobsen | Tórshavn | 40 |
| 2 | Dánjal Michaelsen | Tórshavn | 34 |
| 3 | Jákup Lutzen | Tórshavn | 30 |
| 4 | Fríði E. Mikkelsen | Tórshavn | 26 |
| 5 | Jákup Dahl-Olsen | Tórshavn | 23 |
| 6 | Bergur Johansen | Argir | 20 |
| 7 | Heðin Poulsen | Tórshavn | 18 |
| 8 | Sigurð D. Karlson | Tórshavn | 16 |
| 9 | Jóan Pauli Dahl Jacobsen | Tórshavn | 14 |
| 10 | Edvard Leo | Vestmanna | 12 |

**Dreingir 6-9 ár**

Nr Navn Býur Aldur Stig

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Róaldur Jacobsen | Tórshavn | 40 |
| 2 | Rani G. Jacobsen | Tórshavn | 34 |
| 3 | Brian Vang 9 | Hoyvík | 30 |
| 4 | Knud Glerup | Tórshavn | 26 |
| 5 | Kristoffur Nielsen | Tórshavn | 23 |
| 6 | Kári Joensen | Hvítanes | 20 |
| 7 | Markus Vitji | Tórshavn | 18 |
| 8 | Atli undir Kletti | Tórshavn | 16 |
| 9 | Kristian Kruse | Tórshavn | 14 |
| 10 | Ragnar Kristiansen | Tórshavn | 12 |

# Rógvi í kapping við teir stóru

*Eftir at hava vitjað heima í Føroyum, er Rógvi Johansen aftur at síggja á donsku landavegnum, og kappingarnar eru nógvar*

JÁKUP MØRK

Tvær kappingar hava verið á skránni hjá Rógva, síðani hann kom aftur til Danmarkar.

**Stór nøvn**

Fyrra kappingin av hesum var ein sonevnd gøtukoyring, og ikki kann sigast annað enn, at nógvir heilt sterkir súkklarar vóru við í kappingini. Í fjør var tað Bo Hamburger, sum gjørdist vinnari av kappingini, og saman við liðfeløgunum úr Team MemoryCard Jack&Jones stillaði hann aftur upp í ár. Eisiini var eitt lið frá US Postal, har millum annað hjálparin hjá Lance Armstrong, Tayler Hamilton, var at síggja.

Rógvi greiðir frá, at veðrið var keðiligt henda dagin: -Tað regnaði illa, og hetta var við til at gera teinin, sum var 1.400 m, heldur vandamiklan. Tað var sera hált í svingunum, og eg koyrdi alla tíðina sera varliga. Úrslitið varð tó, at eg til seinast noyddist at gevast, greiðir Rógvi frá.

Hann leggur tó dent á, at tað eftir hansara tykki var sera stuttligt at koyra saman við nøkrum av teimum »stóru«. Vinnari av kappingini gjørdist Lenni Kristensen frá Team Fakta, Bo Hamburger gjørdist nr. 2, meðan Martin Kryger úr Team Fakta vann bronsumerkið.

**Etapukapping**

Dagin eftir fór Rógvi so í holt við eina etapu-kapping. T.v.s. kapping, sum er skipað á sama hátt, sum eitt nú Statoil kring Føroyar.

Eftir at fyrsti dagurin varð nýttir til ein prolog upp á 6,6 km, varð næsta dagin farið undir fyrstu veruligu etapuna, sum var 170 km. til longdar.. Rógvi royndist sera væl henda dagin, og hóast hann saman við fleiri øðrum súkklarum varð koyrdur inn, eftir at hava verið í útbrotið, eydnaðist tað honum tó at halda seg nóg so langt frammi í samlaðu støðuni.

Triði dagurin byrjaði við eini etapu upp á 130 km. Aftur hesu ferð var Rógvi sera aktivur, og hann var eisini her við í fleiri royndum at skapa eitt útbrot. Tað eydnaðist tó ongantíð nøkrum bólki at sleppa rættuliga avstað, og feltið kom at kalla samlað í mál. Rógvi tóktist tó eisini nøgdur við hetta, tí um ikki annað, so misti hann ikki tíð fram til fremru súkklararnar.

Eftir at hava hvílt seg í ein tíma, skuldi so farast undir ein einkultstart. Føroyska súkkluessið helt, at beinini kendist heldur tung, men eftir at hava súkklað róliga einar 20 km., var kortini frægari. Úrslitið í einkultstartinum gjørdist eitt 12. pláss, og samanlagt gjørdist Rógvi nr. 18 av teimum 100 súkklarunum, sum vóru við í kappingini. Av hesum 100 vóru fleiri yrkissúkklarar, so hetta má metast sum eitt sera gott úrslit hjá Rógva.

Sjálvur tóktust Rógvi eisini ógvuliga fegin um úrslitið. Hann vísur á, at tá tað bert vóru tveir súkklarar úr hansara felagið, kundu teir ikki koyra sum lið, og hetta er sjálvsagt ein vansi. Eisini vísur hann á, at liðfelagið hansara, Janus Jørgensen, sum eisini var við á Team Shell, kom inn sum nr. 60 samanlagt.




*Í kapping við fleiri sterkar súkklarar eydnaðist tað Rógva Johansen at vinna eitt samanlagt 18. pláss í Danmark herfyri*



# Guttorm og Sunnuvá avgjørdu í seinasta umfarið

*Guttorm Sørensen og Sunnuvá Bjarnastein endaðu á odda í samlaðu støðuni í Grand Prix 2000 renningini við harðari kapping frá ávikavist Boga Lenvig og Rigmor N. Joensen*



*Úti við 200 luttakarar vóru til seinasta umfarið í Grand Prix renningini*
***Mynd: SJ***

HEINI Í SKORINI

Eftir at Guttorm Sørensen og Bogi Lenvig hava verið lið um lið gjøgnum alla Grand Prix 2000 rennikappingina, megnaði Guttorm Sørensen at draga longra stráið í ólvasøkurennningini, sum eisini var seinasta rennikapping í Grand Prix 2000. Áðrenn ólavsøkurenningina var Bogi Lenvig á odda við 188 stigum, meðan Guttorm hevði 182 stig, so tað var eitt krav fyri Guttorm at vinna ólavsøkurenningina, um hann skuldi koma framum Boga í samlaðu støðuni.

Áðrenn kappingina hóskvøldið var spenningurin sera stórur, um hvør fór avstað við gullinum, og dramatikkurin helt sær til síðsta enda. Fólk, sum hava áhuga fyri hesi ítróttargrein, hugdu við spentum eygum hóskvøldið, og tað var eisini sera spennandi at fylgja við. Guttorm Sørensen vísti, at hann enn er Føroya besti rennari, og hann kom á mál við tíðini 16 min. og 12 sek. Hetta var heili 18 sekund áðrenn Boga Lenvig sum gjørdist á øðrum plássi. Sostatt uppfylti Guttorm tað krav at koma fyrstur á mál. Á vestanstevnu komu Guttorm og Bogi so at siga lið um lið inn um mállinjuna, meðan tað jú sum sagt var størri munur hesaferð.

Teir endaðu báðir við 188 stigum, men við tað at Guttorm endaði omanfyri Boga í ólavsøkurenningini, vinnur hann samanlagt og er sostatt Grand Prix 2000 vinnari.

Kappingin um triðja plássið var eisini spennandi, við tað at Cecil Weihe og Sølvi Reinert Hansen báðir endaðu við 128 stigum í samlaðu støðuni. Men eins og millum Guttorm og Boga endaði Cecil frammanfyri í ólavsøkurenningini og er sostatt omanfyri Sølva í samlaðu støðuni.

**Sunnuvá endurtók bragdið**

Í kappingini hjá kvinnunum var støðan júst hin sama sum hjá monnunum. Áðrenn ólavsøkurenningina var Rigmor N. Joensen á fyrsta plássi við 188 stigum, meðan Sunnuvá Bjarnastein hevði 182 stig. Krøvini vóru tey somu fyri Sunnuvá sum fyri Guttorm, og mín sann um hon ikki endurtók bragdið hjá Guttorm og vann ólavsøkurenningina og harvið Grand Prix 2000. Sunnuvá kom á mál við tíðini 19 min. og 15 sek., og var hon átta sekund fyrr á mál enn Rigmor.

Á triðja plássi endaði Tordis Debes Eiriksfoss einsamøll við 150 stigum, meðan tað síðani er eitt stórt lop niður til restina av rennarunum. Síðani hevði nr. fýra bert 83 stig, so munurin millum topp og botn er rættiliga stórur.

Hjá dreingjum 10-13 ár vann havnarmaðurin Rani Herup Olsen, og í sama aldursbólki hjá gentum vann Ella Joensen úr Kollafirði. Hjá dreingjum 9 ár og yngri vann hoyvíkingurin Brian Vang, og hjá gentum var Sheila Magnussen úr Tórshavn fyrst á mál.

Endaliga úrslitið av Grand Prix renningini 2000

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Futtorm Sørensen | Treystið | 188 stig |
| 2 | Bogi Lenvig | Bragdið | 188 stig |
| 3 | Cecil Weihe | Bragdið | 128 stig |
| 4 | Sølvi R. Hansen | Roysnið | 128 stig |
| 5 | Dia Jacobsen | Bragdið | 103 stig |
| 6 | A. Marni Joensen | Bragdið | 90 stig |
| 7 | Niels Jákup Jakobsen | Bragdið | 84 stig |
| 8 | Hallur Stakkstund | Bragdið | 76 stig |
| 9 | Sigurd Justinussen | Bragdið | 57 stig |
| 10 | Bogi Joensen | Treystið | 54 stig |

Kvinnur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sunnuvá Bjarnastein | Bragdið | 188 stig |
| 2 | Rigmor N. Joensen | Bragdið | 188 stig |
| 3 | Tordis D. Eiriksfoss | Bragdið | 150 stig |
| 4 | Brindis R. Weihe | Bragdið | 83 stig |
| 5 | Borgarhjørt Holm | Bragdið | 82 stig |
| 6 | Ann Thomsen | Bragdið | 61 stig |
| 7 | Maria í Skorini | Treystið | 26 stig |
| 8 | Jana Jacobsen | Miðvágur | 26 stig |
| 9 | Guðrun Poulsen | Tórshavn | 23 stig |
| 10 | Rannvá Hanusardóttir | Bragdið | 20 stig |

# Herfølge fyrireikar seg

*Leiðslan og leikarar tosa í løtuni um heldur óvanda spurningin: Bonus fyri Europa-cup*

JÁKUP MØRK

Hjá ymsu stórfeløgunum inni á meginlandinum er tað helst bara ein vanligur lutur í lønarsáttmálanum, men so er ikki hjá øllum.

Fyri mong kom tað óvart á, at Herfølge í fjør gjørdist danskur meistari, og soleiðis tykist eisini vera í leiðsluni hjá lítla felagnum. Lønarsáttmálarnir, sum teir hava við leikararnar, siga nevnliga einki um, hvørt leikararnir skulu hava eyka samsýning, um teir klára seg væl í europeisku kappingini fyri meistarar.

Hóast tað bert er ein vika til fyrsta dystin, so var hetta enn ikki komið í rættlag týsmorgunin, men smb. liðformanninum, Thomas Høyer og formanninum, Svend-Aage Dreist Hansen, var væntandi, at ein loysn fekst innan heilt stutta tíð.

**Nýggjan leikara**

Annars hevur Herfølge ein nýggjan leikara við til venjingar í hesum døgum. Talan er um danan/spaniólan, Thomas Christensen, sum í seinastuni hevur roynt seg í grikskum fótbólti.

Thomas Christensen spældi upprunaliga við B93, men skifti blaðungur til spanska stórfelagið, Barcelona. Tá hann hevði dupultan statsborgararætt, var hann ikki tengdur at sonevndu útlendingakvotuni, og tað eydnaðist honum eisini at fáa fleiri dystir á besta liðnum hjá Barcelona.

Eisini slapp hann at royna seg á spanska landsliðnum, har hann enn tá skeyt eitt mál í fyrsta dysti sínum.

Síðani hevur yrkisleið hansara tó fingið fleiri álvarslig brák, og eftir at hava roynt seg hjá minni sponskum feløgum, hevur hann so farna árið roynt seg í Grikkalandi, har væntandi lønarútgjaldingar nú hava gjørt sítt til, at hann hevur sett kós heim aftur móti Danmark.

Um og nær Thomas Christensen kann spæla fyri Herfølge, er enn ikki greitt. Saman við sakførara sínum roynir hann nú, umvegis FIFA, at fáa løn sína útgoldna, eins og hann vil hava fatur í spæliloyvinum, sum enn er í Grikkalandi.

# Ólavsøkurenningin -úrslit

*Niðanfyri eru prentað úrslitini av teimum seks kapprenningunum, sum vóru á ólavsøku. Tíggju tey fremstu í hvørjum bólki eru á listanum, men samlaða luttakaratalið var 179*

**5 km, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Guttorm Sørensen | Treystið | 16,12 |
| 2 | Bogi Lenvig | Bragdið 2 | 16,30 |
| 3 | Signar Røsvig | Bragdið 1 | 16,34 |
| 4 | Cecil Weihe | Bragdið 1 | 17,25 |
| 5 | Sølvi Reinert | Roysnið | 17,26 |
| 6 | Dia Jacobsen | Bragdið 2 | 18,01 |
| 7 | Tony Ditlevsen | Tórshavn | 18,04 |
| 8 | Hjalti Gunnarsetin | Bragdið 1 | 18,06 |
| 9 | Sam Vang | Oyrabakki | 18,09 |
| 10 | Hallur Stakksund | Bragdið 2 | 18,13 |

**5 km, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sunnuvá Bjarnastein | Bragdið | 19,15 |
| 2 | Rigmor N. joensen | Bragdið | 19,23 |
| 3 | Tordis Debes Eiriksfoss | Bragdið | 19,42 |
| 4 | Borgarhjørt Holm | Bragdið | 19,57 |
| 5 | Bergljót Bjarnastein | Bragdið | 22,13 |
| 6 | Ann thomsen | Bragdið | 22,14 |
| 7 | Rannvá Joensen | Tórshavn | 24,24 |
| 8 | Brindis R. Weihe | Bragdið | 24,33 |
| 9 | Anna Ø. coyne | USA | 24,44 |
| 10 | Gurið Jacobsen | Tórshavn | 25,09 |

**1168 m, dreingir 10-13**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rani Herup Olsen | Tórshavn | 3,56 |
| 2 | Tróndur Kragesten | Tórshavn | 3,56 |
| 3 | Jóan Karl Jeonsen | Kollafjørð | 4,14 |
| 4 | Jon Gregersen | Sandavágur | 4,16 |
| 5 | Gunnar í Dali | Trongisvágur | 4,21 |
| 6 | Ólavur í Ólavsstovu | Tórshavn | 4,23 |
| 7 | Jónas Stenberg | Argir | 4,28 |
| 8 | Magnus Matras | Bragdið | 4,37 |
| 9 | Rúni Johansen | Tórshavn | 4,39 |
| 10 | Pætur Jørgensen | Tórshavn | 4,40 |

**1168 m, gentur 10-13**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ella Joensen | Kollafjørður | 4,21 |
| 2 | Helga Djurhuus | Tórshavn | 4,26 |
| 3 | Kristina Joensen | Miðvagur | 4,32 |
| 4 | Barbara Tausen | Hoyvík | 4,34 |
| 5 | Maria í Skorini Jacobsen | Treysti | 4,44 |
| 6 | Rannvá Hansen | Sørvágur | 4,50 |
| 7 | Katrin Debes Kristensen | Tórshavn | 4,58 |
| 8 | Rudi Zachariassen | Streymnes | 5,02 |
| 9 | Maria Magnussen | Tórshavn | 5,21 |
| 10 | Hjørdis Harryson | Tórshavn | 5,23 |

**584 m, dreingir 9 ár og yngri**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Brian Vang | Hoyvík | 2,13 |
| 2 | Jógvan Jón Davidsen | Tórshavn | 2,13 |
| 3 | Jan Elmar Sørensen | Treysti | 2,14 |
| 4 | Róaldur Jakobsen | Tórshavn | 2,15 |
| 5 | Brian Djurhus | Streymnes | 2,22 |
| 6 | Jón Kristiansen | Tórshavn | 2,25 |
| 7 | Reidar Luid | Tórshavn | 2,25 |
| 8 | Jógvan Jón Ólavsson | Tórshavn | 2,25 |
| 9 | Margar Berg | Tórshavn | 2,26 |
| 10 | Niels Johansen | Argir | 2,26 |

**584 m, gentur 9 ár og yngri**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sheila Magnussen | Tórshavn | 2,23 |
| 2 | Sára Olsen | Klaksvík | 2,23 |
| 3 | Helena H. Poulsen | Danmark | 2,32 |
| 4 | Maria Holm Lund | Bragdið | 2,35 |
| 5 | Bjørg Seloy | Tórshavn | 2,36 |
| 6 | Helena Jakobsen | Hoyvík | 2,39 |
| 7 | Gurðun Foldbo | Tórshavn | 2,41 |
| 8 | Bjørk Herup Olsen | Tórshavn | 2,42 |
| 9 | Vár Gregersen | Sandavágur | 2,46 |
| 10 | Maria Samuelsen | Haldarsvík | 2,54 |